## Petur Kanin sigur...

Petur Kanin sigur... er ein barna bók skrivað av Beatrix Potter. Bókin er sera væl egnað hjá teimum smæstu børnunum. Bókin hevur klaffar at lyfta hjá børnunum og snýr seg um at bíða leingi, tá man er farin til handils, áðrenn man sleppur framat at keypa. Tá er gott at spæla minnisspæl. Bókin er úr hørðum pappi og kostar 80 kr.




## Formula í danskt KT-samstarv

Holdingfelagið Formula International, sum Eik, Føroya Tele, TF Holding og Formula.fo settu á stovn fyrr í ár, er so smátt við at fáa fótin fyri seg uttanlands. Formula International hevur m.a. sum endamál at keypa upp útlendskar KT-fyritøkur, sum vera mettar spennandi og hava bjarta framtíð, og síðani gjøgnum hesar eisini selja føroyskar KT-loysnir. Í gjár fingu donsku miðlarnir tíðindaskriv frá Norriq, sum er ein stór donsk KT-fyritøka og Formula International eigur part í. Føroysku íleggjararnir vórðu umrøddir sum "den kapital indsprøjtning, sin giver ressoucer til ekspansion." Norriq fremsti útvegarin í Danmark av KT-loysnum við Microsoft Dynamics C5 og NAV, og umsetningur teirra í fjør var 126 milliónir krónur.

# r at nýhugsa



*Hann er búskaparfrøðingur og hevur nú eisini tikið eina útbúgving í "toppleiðslu". Kortini hevur Finnur Sivertsen bæði beinini á jørðini – í hesum førinum í bátinum, tá hann fór á flot í góðveðrinum í vikuni*

støðið hjá føroyskum leiðslum og nevndum er á góðari leið, gera feløg ikki í nóg stóran mun brúk av professionellum nevndarlimum.

Finnur heldur, at góðir møguleikar eru at tilføra ein hóp av vitan úr ymiskum vinnugreinum, um feløgini gjørdu sær ómak at leita eftir fólki við viðkomandi vitan.

> "Eg haldi, at hóast fakliga støðið hjá føroyskum leiðslum og nevndum er á góðari leið, gera feløg ikki í nóg stóran mun brúk av professionellum nevndarlimum..

### Strategiarbeiði

Vit spurdu eisini búskaparfrøðingin, um føroysk vinna kemur at merkja, at vit hava fingið ein "top governance" kantidat?

- Ja, tað vænti eg avgjørt. Fólk, sum lesa "top governance", fáa einki prógv, um tey ikki megna at umseta lærdómin til praktiskar verkætlanir. Hetta hevur ført til, at fleiri spennandi verkætlanir liggja klárar sum spennandi rættir at bjóða føroyska vinnulívinum í næstum.

### Altjóðagerð

Ein spurningur, sum vit ofta seta okkum er, hvussu føroyska vinnulívið kemur at standa seg í altjóðagerðini frameftir.

Hvat heldur Finnur um henda afturvendandi spurning?

- Hetta veldst um fyritøkurnar – um hesar seta strategiarbeiði ovarlaga á dagsskránna og hava hugflog og dirvi til at finna nýggj virkisøki og samstundis megna at fáa tað allarbesta burtur úr sínum starvsfólkum. Megnar tær hetta, er einki sum kann forða eini fyritøku í at mennast – uttan mun til, hvar hon liggur í heiminum.

Finnur Sivertsen leggur dent á, at vitan og skaparevni eru týdningarmesta tilfeingið hjá nútímans samfeløgum.

- Hetta er grundarlagið undir framburði og framtíð, sigur hann.

At enda í samrøðuni ynskir búskaparfrøðingurin at takka BP Amoco Exploration ltd. fyri fíggjarligan stuðul til útbugvingina.



## Gulllaksur og upsi á Beta

**Fleiri landingar hava verið á landingarmiðstøðini hjá Beta í Saltangará hesa vikuna**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Landararnir hjá Beta í Saltangará hava havt rímiliga nógv at gera hesa vikuna. Teir hava landað bæði gulllaks, upsa, longu og svartkalva.

Í dag landar Vestmenningur eini 120.000 av upsa.

Vestmenningur og Fram eru annars á gulllaksaveiði, men í løtuni liggur Fram við maskinskaða. Hendan túrin hava Vestmenningur og Safir verið í »lag«, meðan bíðað verður eftir, at Fram verður klárur, helst um einar 14 dagar ella so.

Sum skilst, skal Fram hava nýggjan aksil.

Vestmenningur og Fram hava saman verið fýra túrar á gulllaksi, og farið verður aftur á gulllaks, tá Fram er klárur til fiskiskap aftur.

Eysturbúgvin hevur eisini landað í Saltangará í dag. Teir høvdu eini 200.000 pund av gulllaksi. Eysturbúgvin og Vesturbúgvin partrola, og Vesturbúgvin landar í Vestmanna, har tey eisini arbeiða gulllaks.

Hósdagin landaði línuskipið Váðasteinur hjá Beta. Teir høvdu eini 80.000 pund. Størsti parturin av veiðini var longa.

Polarhav og Stjørnan landaðu eina stóra last av gulllaksi í Saltangará hósdagin. Teir høvdu 430.000 pund tilsamans.

Mikudagin landaði ísfiskatrolarin Kalsevni 140.000 pund. Kalsevni partrolar saman við Grími Kamban, sum landaði aðrastaðni.

Mánadagin var garnaskipið Vesturland í Saltangará. Teir høvdu umleið 40.000 pund av havtasku.